Løgtingslóg

um

broyting í løgtingslóg um kommunustýri (Kommunustýrislógin)
(Broyting av skuldarmarki)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003 og løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018, verður § 43, stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Er nettoskuldin meira enn árliga inntøkugrundarlagið hjá kommununi frá persónsskatti og flytingum frá landinum, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum. Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkugrundarlagið og nettoskuldin skal roknast."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Samtykt á Løgtingi hin 4. mai 2023 við 30-0-0 atkvøðum.

formaður

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 4. mai 2023

stjóri

LM-058/2022